# VÁTTAN UM ÍSETING AV ÍKOPLINGARÚTBÚNAÐI (Les vegleiðing á baksíðu)

Hesin bilur, við loyvdari heildarvekt á í mesta lagi 3500 kg

| Merki og modell | Skrokknr. | Skráset.nr. (um skrásettur) |
|---|---|---|
| | | |

Hevur fingið ísettan íkoplingarútbúnað til viðfestisakfar sambært leiðbeining frá bilframleiðara.

Bilurin lýkur krøvini fyri akfør, ið skulu nýtast til óskoðaða samankopling.

Á íkoplingarútgerðini er merking, ið vísir navn á framleiðara og slaggreining (typebetegnelse), umframt mest loyvdu heildarvekt á viðfestisakfari.

Ynski er um at fáa bilin skrásettan til óskoðaða samankopling við hesum vektásetingum:

Mest loyvda heildarvekt (kg) á viðfestisakfari við bremsum:

Mest loyvda heildarvekt (kg) á viðfestisakfari uttan bremsur:

Undirritaði er MVG-skrásettur sum bilaverkstaður, bilasøla ella sølufyritøka fyri viðfestisakfør og havi V-tal: ________________________

Dagur

Undirskrift

Stempul hjá fyritøkuni

Váttanin verður givin undir revsiábyrgd.
Sí vegleiðing á baksíðu um skráseting og útfylling av oyðublaði.

**Gevið gætur: Sambært § 163 í revsilógini er revsivert at veita ósanna váttan til nýtslu hjá almennum myndugleika. Revsingin fyri hetta er bót ella fongsul í upp til fýra mánaðir.**

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REPROZ

# VEGLEIÐING

**Um at skráseta óskoðaða samankopling uttan sýn**
Fyritøka, ið setir á íkoplingarútbúnað til viðfestisvogn og gevur váttan um hetta, skal vera MVG-skrásett sum bilaverkstaður, bilasøla ella fyritøka, ið selur viðfestisakfør.

**Bilurin**
- kann í mesta lagi hava eina heildarvekt, ið er 3500 kg, og
- fráboðan til skráseting hjá Akstovuni skal verða framd, áðrenn bilurin verður tikin í nýtslu eftir íseting av íkoplingarútbúnaðinum, og kann bert gerast uttan sýn, um fráboðanin verður framd í mesta lagi 8 ár eftir fyrsta skrásetingardag hjá bilinum, (sí skrásetingarskjal).

**Íkoplingarútbúnaðurin**
- skal hava 50 mm koplingskúlu og merking (plátu), ið tilskilar merki og slaggreining, umframt hægst loyvdu teknisku vekt hjá viðfestisakfari,
- skal setast í bilin sambært vegleiðing frá bilframleiðaranum, og
- el-útgerðin (7- ella 13-pol stikk) skal bindast saman í samsvari við ásetingarnar í »Detailforskrifter for Køretøjer«.

**Útfylling av oyðublaði**
Bilmerki, modell, skrokknr. og skrásetingarnr. (um bilurin er skrásettur) verða skrivað sambært skrásetingarskjalinum fyri bilinum (ella »typeattest«).

Mest loyvda heildarvekt á viðfestisakfarinum, við/uttan bremsur, kann ikki fara upp um
a) tær av bilframleiðara ásettu hægst loyvdu teknisku vektir á viðfestisakfari við/uttan bremsur.
b) tær av framleiðara av koplingsútbúnaðinum hægst loyvdu teknisku vektir á viðfestisakfari (sí merking á plátu), og
c) **fyri viðfestisakfar við bremsum:**
- heildarvekt á bilinum (tó 1½ ferð heildarvektina um talan er um lendisfarandi bil).

**fyri viðfestisakfar uttan bremsur:**
- 50% av tænastuvektini á bilinum (koyriklár vekt við fullum brennievnistanga og førara).
- 750 kg.

Uppgev tær lægstu av teimum undir a), b) og c) nevndu vektunum. Eisini kunnu uppgevast lægri vektir enn omanfyri nevnt, um so er, at eigarin bert hevur koyrikort til bólk B.

**Eftir at útgerðin er sett á bilin, verður oyðublaðið sent Akstovuni, áðrenn bilurin verður tikin í nýtslu.**
**Somuleiðis skal gjald á kr. 150,- verða goldið fyri koplingsváttan.**

Um so er, at feilur verður funnin í skrásettu vektunum, verður bilurin kallaður til sýn.